## DAGSINS MEINING

# So hendi tað aftur

Seinastu árini hava vit verið vitni til, hvussu stórt tilfeingi er í okkara ungu tónleikarum. Og nú hendi tað so aftur. Hesaferð vóru tað Lena og nakrir av frægu tónleikarum okkara, ið tóku okkum øll á bóli. Konsertirnar í Norðurlandahúsinum sunnudagin vóru bara enn ein áminning til okkum øll um, hvussu stórt tilfeingi finst í okkara tónlistafólkum, nakað, sum vit eiga at hava stóra virðing fyri og frøðast um.

Tað er ikki so langt síðani, at Eivør og Pætur tóku øll tey, ið vóru so heppin at fáa pláss í Christianskirkjuni, á bóli. Henda kirkjukonsertin var so bara dropin, sum fekk bikarið at flóta yvir. Undan hesi konsertini hevði hetta nýggja stjørnuskotið í føroyska tónleikaheiminum hugtikið grannatjóð okkara Ísland, og í skrivandi løtu eru hon farin at síggjast á tónleikahimmalinum á meginlandinum við.

Og taka vit onnur nøvn í rúgvuni, ið hava gjørt vart við seg og sum vit fara at hoyra meira til í framtíðini, so eru har Teitur, Guðrun, Brandur, Týr og Klikkheys fyri bert at nevna nøkur av teimum, sum hava verið við til at seta dagsskránna.

Nú fingu vit so eisini okkara Lenu at hoyra og síggja. Og tey hepnu, ið vóru við til konsertina, kunnu bert fegnast um at hava átt henda framíhjárætt. Ein einastandandi konsert við framúr góðum tónleikarum og sangi. Tað kundi eins væl verið í London, í Berlin ella í Stokkhólmi. Nakað altjóðaligt og framúr professionelt var yvir hesi konsertini.

Tað er at fegnast um, at føroysk tónlist hevur so góðar dagar. At hon er við at lyfta seg sjálva upp á teir hægru tindarnar. Fræini, sum hava verið løgd nú í eina tíð, eru brádliga farin at spíra og vit uppliva vakran og frálíkan tónleik. Eitthvørt samfelag og fólk hevur brúk fyri tónleiki, og grundarlagið eru tey fólkini, sum við royndum, góðum evnum og við venjing havt bygt seg upp til at vera nakað og geva nakað.

Eins og vit hava sæð, hvussu okkara fótbóltslandslið hevur økt um áhugan fyri fótbólti millum okkara ítróttaríðkandi ungdóm, soleiðis er eisini við okkara tónleikarum, sum eftirhondini lættliga kunnu manna eitt føroyskt tónleikalandslið. Her eiga vit fólk, sum kunnu manna øll plássini á vølli. Lena og hennara tónleikarar hava við tónleiki sínum fingið pláss á tónleikalandsliðnum. Og eins og okkara fótbóltslandslið er ambassadørur fyri lítlu tjóð okkara, so kunnu hesi frægu tónlistafólkini vera líknandi ambassadørar – á sín hátt. Vera við til at skapa áhuga og virðing fyri hesi fjarskotnu tjóðini úti í Atlantshavi.

Í langa tíðhava høvuðtjakevnini verið fiskur og ítróttur. Einki negativt um tað, tí meðan fiskurin hevur verið við til at halda búskapinum gangandi, so hevur ítrótturin hildið lív í einum sunnum og virknum ungdómi. Men nú fer tónleikurin og tónlistamentanin kanska at vinna so mikið frama, at umframt fiskin og ítróttin verður tónleikurin tað, sum vit eisini fara at tosa um. Tosa meira um. Vit eiga ikki at gloyma tað arbeiði, sum verður gjørt á Musikskúlunum, og nú tónleikarar hava tikið stig til eitt meginfelag fyri tónleikin, við tí rámandi og vælklingandi navninum MENTÓN, eigur alt samfelagið at taka undir við hesum og stuðla. Røddirnar hjá Lenu, Eivør, Guðrun, Teiti og Brandi og tónleikurin hjá teirra musikarum, eiga at fáa okkum øll og her ikki minst politikararnar at rakna við. Vit eiga rætt og slætt at raðfesta tónleikin hægri – og raðfesta hann sum var hann eitt Guds givið tilfeingi og ríkidømi til okkum eisini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tá tjóðveldið rýmdi frá uppvaskinum

**Bjarni Djurholm**

**Tjóðveldið hevur avdúkað seg sjálvt. Flokkurin hevur ongan týdning í politisku telvingini og eingin saknar hann.**



Farna árið hava greiðar ábendingar verið um, at vit eru ávegis lakari tíðum, har búskapargongdin við sól og undanvindi síðani seinnu helvt av nítiárunum fór at venda og væntast kundi, at nú fór at lota ímóti. At neyðugt varð at leggja á annan bógv, at reka varnari fíggjarpolitikk.

Hetta visti tjóðveldið fullvæl. Umsat fíggjarmál, so eingin man ivast í, at flokkurin visti hvønn veg tað bar.

Trupulleikin fyri tjóðveldið var bara, at nú var ikki stuttligt at vera við meira. Trúttanin um, at teir vóru upprunin til framgongd og bjartskygni fór at verða avdúkað sum reyp, so nú var annað til ráða at taka.

**Øsingin**

Tí var skilagott at vera við í enn eini øsing, har flokkurin skuldi umboða tað rætta og óspilta, um-boða framtíðina, meðan hini framhaldandi vóru sett at umboða ábyrgdarloysi og fortíðina.

Tí var bókin til jóla, har tjóðveldismenn áttu sín leiklut, júst høvið at smoyggja sær úr samgonguni, at seta løgmanni og Fólkaflokkinum krøv, sum tjóðveldið visti ikki kundu vera gingin á møti. Pallurin varð settur upp, ivin var miðilin - hurlivasin endamálið. Tjóðveldið fekk durafjórðingin, men hetta var júst ætlanin. Teir tordu ikki meira.

**Reyp**

Síðani hava teir sum vant áhaldandi ákært øll hini at vera ábyrgdarleys. Ganga og fetta sær á, bringubrattir eins og smádreingir, sum við sveittabroti spæla roysnismenn í burturbeindum bátum í onkrari sandrúgvu, har eingin vandi er á ferð, har alt er reyp, róp og ber tjóðskapan.

Í veruleikanum minnir tjóðveldið mest um teir, sum altíð eru klárir til veitslu, bara onnur fyrireika hana. Sjálvir standa teir so í durinum og ynskja øllum vælkomnum, eru í veitslu- og reypingarhýri, ynskja so øllum góða nátt á trappusteininum, men síkja sær so burtur, tá ruddast skal av borðunum og uppvaskið er fyri stavn.

**Vend í**

Tað er lætt at verja borg, tá eingin søkir. Soleiðis hevur verið farnu tvey valskeiðini. Løturnar hava verið sera lagaligar. Búskaparliga hevur framgongdin verið søgulig, góður fiskiskapur, góðir og støðugir avreiðingarprísir, lækkandi rentustøði, rímiligur orkuprísir, alingin í stórvøkstri. Ja, snøkt sagt eitt viðrák av teimum fáu. Tí hevur tað verið lagaligt at reka fíggjarpolitikk. Tað hevur verið lagaligt at sita við ábyrgd. Til fyri ári síðani, tá alsamt greiðari ábendingar vóru um, at nú fór vend at koma í, at vit fóru at nærkast normalum viðurskiftum.

**Ongan týdning**

Hetta átti ikki at komið óvart á. Men fyri tjóðveldið var hetta so nóg mikið. Nú ráddi um at sleppa sær burtur. At koma sær í andstøðu og haðani at skýra øll hini fyri ódugnaskap, samstundis sum flokkurin um dagarnar varp eitt neyðaregg av fíggjarlógaruppskoti, sum einki kjølfesti hevur í veruleikanum, og sum í stóran mun er óveruligt og lítið annað enn reyp. Her avdúkar flokkurin seg sjálvan. Hann avdúkar, at hann ongan týdning hevur í politisku telvingini. At hann bara situr í andstøðu, og at eingin saknar hann.

Tað er ólíka lættari á landsfundi í Klaksvík, saman við íslendsku kommunistunum Vinstri-Greinir, at geva fólkaflokkinum skuldina fyri egna ómegd, heldur enn at taka í egna barm. Forrestin sendi Vinstri-Greinir og Torbjørn Jacobsen, vegna tjóðveldið, samhugafjarrit til Yasser Arafat farna heyst. Ólíka avdúking.

# Til tey føroysku arbeiðarafeløgini

**Sue Philbrow**
*650 Toftir*



Eg havi bæði í útvarpi og bløðum hoyrt fleiri úttalilsir viðvíkjandi vernd av arbeiðsplássum vegna limir tykkara, altso teir føroysku limirnar. Uttan at kasta meg út í kjakið hvørt útlendingarnir í Føroyum eru ov nógvir ella ei, so haldi eg at her er okkurt, ið treingir til at verða víst á.

Rættið meg, um eg fari skeiv, men er tað ikki soleiðis, at útlendsk tímalønt arbeiðsfólk eisini verða noydd til at gerast limir í arbeiðarafelagnum, og at betala limagjald fyri tað, altso eru útlendingarnir ikki fult rindandi limir í feløgunum við harav fylgjandi rættindum eins og føroyingar? Og áttu tit ikki at arbeitt fyri hesar útlendingar júst sum tit arbeiða fyri føroyingar? Er tað ikki vandi fyri, at tit diskriminera millum limirnar? Stendur tað skrivað í fakfelagsviðtøkunum ella reglunum, at føroysk arbeiðsfólk hava rættindi fram um útlendsk arbeiðsfólk?

Í og við at útlendingar mugu gjalda fyri at vera í fakfelag eins og øll onnur, so hava tit í veruleikanum bara eitt val, nevniliga: at arbeiða uttan mismun fyri rættindunum hjá øllum tykkara limum.

Eg nevni hetta nú, áðrenn hetta mál tekur dik á seg, og verður atvold til at eitt órættvísi verður framt.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Nú má Sambandsflokkurin tryggja kappingarførið í Suðuroy – tað skyldar hann okkum

**Petur S. Johannessen**



Fyrst nakrar viðmerkingar til landsfundin.

Eftir at hava verið á landsfundi hjá Sambandsflokkinum síðsta vikuskifti var nakað tosað um at loysa ósemjurnar innanborða og ikki í fjølmiðlunum, hetta skuldi tey fornermaðu, sum stungu Johan Dahl í ryggin og avskrivaðu hann, havt hugsað um. Sum øll vita, so løgdu tey fornermaðu saman ráð og gott stuðlað av fjølmiðlunum og løgmanni, fingu hesi fornermaðu koyrt Johan Dahl frá.

Men nú skal alt viðgerast innanborða og hyggjast má frameftir siga hesi fornermaðu. Meina tey, at vit fara at gloyma ta beistagerð, hesi hava gjørt ímóti tí umboð, sambandsveljarar í Suðuroy valdu at umboða okkara valdømi á tingi, virða hesi fornermaði okkum so lítið, tað sær tað út til, men eg skal minna hesi fornermaðu á, at vit koma at krevja okkara rætt og virðing aftur og koma vónandi at seta tykkum so dyggiliga uppá pláss.

Nú vóni eg, at Sambandsflokkurin fer at taka trupulleikarnar í vantandi kappingaførinum hjá Suðuroynni upp sum skjótast, tað skyldar Sambandsflokkurin okkum so sanniliga, og Sambandsflokkurin má vísa, at hann veruliga vil loysa okkara trupulleikar og ikki fella í somu grøv, sum nógvir av hinum flokkunum, nevniliga at tað ongar gerðir eru aftan fyri orðini ella lyftini, men veruliga vísa, at Suðuroyggin eigur onkran góðan at líta á, og eitt tað fyrsta er eftir mínum tykki at vit fáa staðfest, um Smyril gevur hall ella avlop, tað gerst best við at frá 01 – 01 – 05 verður roknskapurin hjá Smyrli á Drelnesi og ikki í Tórshavn, vit mugu nú til at desentraliserða umsitingina, soleiðis at vit øll fáa ein bita av kakuni.

Nú mugu vit fáa at vita, um vit skulu verða verandi í Suðuroy, ella at tað eingin framtíð er til okkum her. Samgongan má taka støðu til hetta viðbrekna mál sum skjótast, um so er, mugu fortreytirnar tryggjast.

# Tað sum sjálvstýri gevur

## Aftursvar til Jógvan Jacobsen

**Erling Simonsen**

Halló Jógvan Jacobsen, takk fyri svarið. Tú skrivar at føroysku politikararnir tæna tveimum hærrum, Føroya fólki og donsku stjórnini og gera føroyingar ikki sum danska stjórnin vil, kann tað fáa avleiðingar fyri danska stuðulin til Føroya. Her eri eg ikki samdur. Vit hava havt eina fullveldissamgongu í uml. 6 ár, hendan samgonga hevði ikki til endamáls at tæna donsku stjórnini og gjørdi tað heldur ikki, men minkaði studningurin av hesum, nei, hann vaks, teir tóku 5,6 milliardir heim til Føroya hetta tíðarskeið, so eg haldi ikki, at hatta argumentið hjá tær heldur. Um blokkstuðulin er korruptur veit eg ikki við vissu, men føroyingar umsita hann 100%.

So skrivar tú um studningsbúskapin í 80-árunum og at hann var korruptión av fúlasta slag. Studningsbúskapurin kom fyrr enn so, tað var tjóðveldisflokkurin, sum longu í 60-unum kom við ráfiskagrunninum, tann studningurin bar kanska brá av korruptión, »meira skal meira hava«.

Eitt er sikkurt, at fult sjálvstýri gevur møguleikar fyri enn størri korruptión, lít teg bara um í ymisku londunum í verðini, Italia, Rumenia, Irak, Rusland, USA, Filipsoyggjarnar osfr.

So koma vit til altjóða kappingar. Har luttaka vit á jøvnum føti við aðrar tjóðir, vit eru við HM og EM kappingum í fótbólti umboðandi Føroyar. Merkið veittrar so fagurt og frítt og føroyski tjóðsangurin ljómar so fagurt hvørja ferð fótbóltslandsliðið leikar bæði heima á landi og úti í stóru verð, og eitt kann eg siga tær Jógvan, eg syngi við av fullum hjarta, og veitst tú hví? Tí eg eri føroyingur og verði aldri annað! Nær vit fáa umboða í Olympisku leikunum veit eg ikki, men kanska er tann uppgávan heldur torfør og eg trygvi eisini, at tann ítróttarliga uppgávan er rættiliga torfør! Men eg eri samdur við tær í, at vit eiga góð ítróttarfólk á nógvum økjum, men um vit eru nóg góð til olympiskar meistarar, tað ivist eg í, og eg ivist eisini í, um vit skulu hava tað sum mál!

EUROVISION Song Contest er eitt ógvuliga kommersielt fyritakandi, men vit eiga nógvar góðar tónleikarar og sangarar, so reint fakliga kundu vit verið væl umboðað, men kommersielt, tað ivist eg í!

At enda skrivar tú um grønar keks og at eg vil selja meg og mínar landsmenn fyri hesar. Hetta reglubrot skilji eg ikki rættiliga. Eg havi aldri hvørki selt meg sjálvan ella mínar landsmenn til nakran, men eg eri frælsur til hvat sum helst. Annars haldi eg at tað var fullveldissamgongan, sum kom við hasum grønu keksunum, men tær kunnu neyvan bjarga okkum í einum møguligum fullveldi. Tit høvdu møguleikan í 6 ár, men hvat hendi, tit tordu ikki! Reyp og aftur reyp!!!

Annars takk fyri samskiftið.

# Kvinnuhúsið fær 376 áheitanir um árið

**Kvinnuhúsfelagið í Havn hevur havt aðafund**

KIVNNUHÚS
*Tíðindaskriv*



Hósdagin 18. mars hevði Kvinnuhúsfelagið aðalfund. Í nevndini í Kvinnuhúsfelagnum sita Finngerð Fríðriksdóttir, forkvinna, Eyðrith Leyni, næstforkvinna, Henrid Johansen, kassameistari, Sólrun Jacobsen og Masa Christiansen. Eykalimir eru Ása Holm Jacobsen og Meinhild Geyti. Roknskapurin varð góðkendur og Sonja Klein afturvald til grannskoðara, eykagrannskoðari er Gunnvá Haldansen. Í nevndini í Kvinnuhúsgrunninum sita Turið Debes Hentze, Brynhild Danielsen og Judith Johannesen.

117 limir eru í Kvinnuhúsfelagnum. Av hesum hava 41 arbeitt sum sjálvbodnar í vaktarskipanini sum kvøld- og náttarvaktir, sitið í nevndum og ráðgeving.

Síðani Kvinnuhúsið byrjaði sítt virksemi tann 1. oktober 1990, hava 205 kvinnur og 194 børn gist á Kreppumiðstøðini. Kvinnur og børn hava, áðrenn tey komu í Kvinnuhúsið, upplivað antin sálarligan harðskap, likamligan harðskap ella bæði. Í meðal gista á hvørjum ári 15,8 kvinnur og 14,9 børn á Kreppumiðstøðini. Áheitaninar til Kvinnuhúsið eru í meðal 376,2 um árið. Tilsamans hava 4.890 áheitanir verið til Kvinnuhúsið hesi árini, vit hava virkað.

Endamálið hjá Kvinnuhúsfelagnum er at reka Kvinnuhúsið/Kreppumiðstøðina, har kvinnur kunnu ringja ella støkka inn á gólvið og fáa ráðgeving og vegleiðing í ymiskum spurningum og trupulleikum. Ikki er neyðugt hjá kvinnuni at upplýsa navn og p-tal. Heldur ikki er neyðugt hjá henni at rættvísgera, hví støðan er sum hon er. Kvinnan hevur møguleikan, saman við sínum børnum, at gista á Kreppumiðstøðini eitt tíðarskeið.

Arbeiðið í Kvinnuhúsinum er grundað á sjálvboðið arbeiði. Sjálvbodnu vaktirnar eru virknar í meðal 2-3 ár. Ein jøvn útskifting fer fram, tí hava vit altíð tørv á nýggjum vaktum. Hevur tú hug at luttaka í hesum fjølbroytta arbeiði, set teg í samband við Kvinnuhúsið og frætt meira.

# Hvat kostar loysingin?

**Kai Vágfjall**



Ein, Helgi Abrahamsen, hevur í bløðunum síðstu tíðina sett einum ungum manni úr Leirvík, Knút Eysturstein, fyrispurning hvat loysingin kostar. Ikki er sørt at hann hevur hug at gera gjøldur burtur úr hesum unga manni, sum eg als ikki kenni, men sum á skriving síni virkar skilagóður. Hann, ið spottar annan, spottast sjálvur, sigur orðataki.

Eitt annað orðatak sigur, at "ein býttlingur kann spyrja, meira enn ein vísur kann at svara". At seta slíkan spurning, er púra burturvið. Júst nú hevur landsstýrissamgongan lagt eina fíggjarlóg fram. Útrokningar siga, at hon fer at geva kr. 277.000.000 í halli. Hetta er sjálvandi bara ein meting. Eingin kann siga hvat úrslitið verður við árslok. Hon kann jú geva størri hall enn roknað hevur verið við, men kann eisini geva væl minni hall, enn roknað varð við. Tíðirnar broytast alla tíðina, bæði til tað betra og til tað verra. Tað sama verður við eini fíggjarætlan, aftaná loysingina.

Í løtuni er blokkurin umleið 600.000,- kr., harav ein partur er rindan fyri donsk áhugamál her á landi. Landsstýrið rindar góðar 300.000.- kr. í rentum og avdrøgum um ári. Tá undanfarna samgonga ráddi fyri borgum, og tjóðveldisflokkurin umsat fíggjarmál, vóru lániavdrøgini goldin niður við risaferð. So tá skuldin einaferð er goldin, er ikki langt eftir á mál. Men útlitini eru ikki bjørt, nú sambandslandsstýrið hevur tikið vil, og hevur kunngjørt at teir ætla sær at ræna peningin, sum undanfarna samgonga hevur spart upp í Landsbankanum. Hetta var júst tað sum tjóðveldisflokkurin spáddi í valstríðnum. Teir eru væl stuðlaðir av fólkaflokkinum, sum alla tíðina hevur staði klárir við eini slangu aftur í landskassan, sum teir vóru við at tøma í 80-unum. Ein armóð rættir aðrari hondina.

Skrivingin hjá hesum erka sambandsmanni, er, sum ikki einaferð, ein niðurgering av føroyingum, sum einki nytta, einki duga o.s.fr. Tær milliardir, sum føroyski skattaborgarin leggur í landskassan vigar einki í teirra eygum, ímóti teimum 600.000,- kr., sum danir rinda í blokki.

Tosað verður um, at vit missa vælferðina, um vit ikki fáa danskar pengar. Mær rennur orðini hjá Ebba Rasmussen í Hesti, tá hann helt røðu á fólkafundi úti í Koltri fyri umleið tveimum árum síðani. Hann tók nakað soleiðis til: "Tosa verður um vælferðina. Hvat er vælferð okkara?? Hon er her úti í sundinum, í bjørgunum, í bø og haga og í havinum rundan um land okkara" Hatta var orð fyri ein rættan mann, sum alt sítt lív hevur arbeitt og bara havt hendurnar á at líta, og sum hevur sett álit sítt á Gud, í staðin fyri á útlendskar pengar.

Eg havi sæð í bløðunum sambandsmenn skriva um sambandshugsjónina. Eg veit ikki hvat tað er fyri nakað. Kann ikki bara mær, men má flenna, tí hvat er tað fyri ein hugsjón, at man vil hava eina fremmanda makt at hava ræði her á landi. Hetta er helst eitt serføroyskt fyribrigdi, tí hetta fyribrigdi finnist ikki í nøkrum øðrum landi í heiminum. Nei, vont man vera á annan at líta.